

## GM fyrireikar húsagang

Meðan leiðslan í General Motors alment framvegis stríðist fyri at finna nýggjar sparingar fyri at bjarga bilrisanum, verður samstundis arbeitt innanveggja við at fyrireika felagið upp á húsagang. Mánadagin í farnu viku avvísti Obama forseti ætlanini, sum leiðslan við Fritz Henderson á odda legði fyri forsetan til tess at tryggja ein statsstuðul til framhaldandi rakstur upp á 13,4 milliardir dollarar. Men Obama metti ikki ætlanina nóg umfatandi og gav felagnum 60 dagar at finna eina aðra og betri loysn. Men nú bendir mangt á, at leiðslan sjálv ikki trýr upp á eina bjargan, skrivar Bloomberg News. Framlagda ætlanin gekk út upp á at skerja skuldina við 46% og at siga 47.000 starvsfólkum upp í 2009. Men amerikansk lóggáva gevur ræpttiliga fríar teymar innan gjaldssteðg og húsagang, millum annað at taka avlopsgevandi partar úr felagnum og stovna nýtt felag við hesum, skrivar Boersen.dk

# Alivinnan nýtt bein hjá

**Fyri trimum árum síðani keypti Vónin alinótavirkið við Norðskála, og nú pelagiska vinnan meiri ella minni liggur still, hevur hetta nýggja beinið hjá Vónini enn størri týdning. – Vantandi virksemið innan pelagisku vinuna hevur merkt, at vit hava verið noydd at siga fólki upp, men innan alivinnuna gongur tíbetur væl, sigur Hjalmar Petersen, stjóri á Vónini**

ALIVINNA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*



*Fleiri konufólk arbeiða á alinótavirkinum hjá Vónini. Hetta arbeiði hevur nógv at gera við at seyma, so tað riggar fínt, sigur virkisleiðarin*

Vónin er mest kend fyri sína framleiðslu av trolum og trolútgerð, men tað er kortini ikki alt, sum fyritøkan fæst við. Á Norðskála hevur Vónin eisini eitt virki, men tað fæst ikki við trol.

- Nei, tað, sum vit fáast við her á Norðskála, eru alinótir, og tað mesta arbeiðið her er nokk umvæling av alinótum, sigur Hjalmar Petersen, stjóri á Vónini.

Bilarnir fara út at heinta nótirnar, síðani verða tær vaskaðar. Harnæst verða tær tiknar inn á virkið har tær verða eftirhugdar og umvældar, og beint áðrenn tær verða settar út aftur, verða tær impregneraðar.

Á virkinum á Norðskála høvdu vit sett stjóranum á Vónini, Hjalmar Petersen, og virkisleiðaranum á Nótavirkinum, Signar Poulsen, stevnu.

- Tað er soleiðis, at alarin ringir og biður okkum koma at heinta eina nót, sum teir so hava umborð á einum báti ella inni á einum innhegnaðum øki, sambært fyriskriftunum hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Síðani fara vit á staðið við okkara góðkendu bilum – og vit eru nú teir einastu, sum hava góðkendar bilar – ið hava fløskutættar lastir og fylgja greiðum mannagongdum við sóttreinsing, sigur Signar Poulsen.

Tað er neyðugt at sóttreinsa bilarnar millum hvørja uppgávu, tí teir koma kring alt landið, og aliøkini eru væl atskilt. Alt verður so savnað á virkisbygninginum við Norðskála, so neyðugt er við strongum managongdum, fyri at sleppa undan smittu.

- Tá so nótirnar koma inn á vaskiøkið – vit hava tvey, eitt í Fuglafirði og eitt á Norðskála – verður nótin fyrst tikin inn á tað, sum vit nevna fyri skitna økið, har nótin verður gjørd klár til vask, endar verða tiknir úr og tilíkt. Harfrá fara tær so í eina vaskimaskinu, sum er plcstýrd, sigur Signar Poulsen.

Tað merkir, at vaskingin er teldustýrd við ávísari nøgd av vatn i og ávísari nøgd av klori. Tað tekur millum fýra og sseks tímar at vaska, og tá hon kemur úr maskinuni er hon sum regul gullrein.

- Harfrá verður hon so tikin inn í høllina til umvælingar, sigur Signar Poulsen.

### Strangar skipanir

Tá Signar Poulsen tosar um góðkenningar, so er talan um heilsufrøðiligar góðkenningar til tess at fyribyrgja sjúku.

- Ja, hetta er ein skipan sum er komin í gildi fyri árum síðani. Vit hava øll árini havt eitt gott samstarv við Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, og góðkenningarnar ganga út nú einaferð í summar, og vit royna altíð at vera upp á forkant við at fáa tær fornýggjaðar, sigur Signar Poulsen.

Hetta er serliga neyðugt, tí nótir koma úr øllum herðasornum í landinum, heilt frá Suðri av og norður í Norðoyggjar.

- Vit eru í løtuni einasta virki, sum tekur sær av at vaska alinótir, og tað hava vit verið síðani januar 2006, tá vit keyptu hetta virkið, sigur Signar Poulsen.

Vaskingin fer sum nevnt fram í tveimum støðum, Norðskála og Fuglafirði.

- Vit hava keypt eina nýggja vaskimaskinu, sum vit hava sett upp í Fuglafirði. Orsøkin til tað er, at vit hava gjørt eitt øki klárt í Fuglafirði við betongveggjum og sóttreinsing. So tað er ein ógvuliga góð skipan, sum er í Fuglafirði, og tað er tí, vit hava valt at byggja út har, sigur Signar Poulsen.

Eisini reglurnar fyri spillvatninum frá vaskingini eru strangar.

- Skipanin loyvir ikki spillvatninum út, fyrr enn ymisk tøl eru góðkend av skipanini, sum Heilsufrøðiliga Starvsstovan framman undan hevur góðkent. Skipanin viðgerð alla tíðina vatnið, sum fer gjøgnum ymisk filtur og verður klorviðgjørt, áðrenn tað fer út gjøgnum eina skipan hjá Havsbrún, sum leiðir tað út á streymasjógv, sigur Signar Poulsen.

### Týdning við reinum nótum

Men hvussu ofta senda alarar so sínar nótir til reinsan.

- Frá útseting, tá laksurin er um 100 gramm, og til tøku, ganga áleið 18 mánaðir. Men flestu alarar taka nótirnar upp eftir 10 til 12 mánaðum, tí fiskurin gongur í smámeskaðum nótum fyrst og síðani fara teir í stórmeskaðar nótir. Tað hevur eisini sínar fyrimunir, tí tá nótirnar eru reinar eru meskarnir opnir og fiskurin veksur skjótari tá, sigur Signar Poulsen.

- Tað er nógv betri fyri trivnaðin hjá fiskinum, tí gróðurin veksur skjótt og meskarnir typpast, so fiskurin fær onga ilt.

- Flestu alarar hava í minsta lagi tríggjar lokalitetir til sínar alinótir, og tá ein alari tekur, koma kanska einar 10-15 stórmeskaðar nótir inn, og tær skulu so nýtast aftur á einum øðrum lokaliteti. Tær verða so settar út ein mánað ella